# Veðrið

**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av suðri, skýggjað, men út á dagin regn vestaneftir. Hann veksur vindin upp í hvassan vind av landsynningi og um kvøldið upp í strúk í vindi. Hitin millum 8 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann støkkur vesturum og minkar vindin, men veksur skjótt aftur upp í hvassan vind av vestri og útsynningi. Fyrst á degnum skýggjað við ælaveðri, men sum fráliður slítur í og onkrir sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi. Skýggjað við regni ella ælaveðri. Mánaháttina minkar hann vindin nakað og slítur í. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul, lækkandi niður í sunnan. Skýggjað við nakað av sól, tó okkurt ælið. Hitin millum 6 og 10 stig.



*Nýggi sløkkiliðsbilurin hjá vestmenningum er umbygdur til sløkkiliðsbil í Ólavsfirði í Íslandi. Hann skal loysa av 33 ára gamla bilin hjá sløkkiliðnum. Stjórin hjá MT-Bilum í Ólavsfirði er sjálvur komin til Føroya við bilinum, sum varð skrásettur í gjár*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Vestmenningar nýggjan brandbil

*— Vit eru sera fegnir um hendan bilin, sigur Símun Simonsen, brandmeistari í Vestmanna*

EIRIKUR LINDENSKOV

Nýggi brandbilurin hjá sløkkiliðnum í Vestmanna er ein Ford F-550. Hann skal loysa av 33 ára gamla Toyota Landcruiser brandbilin, sum nú verður seldur.

— Vit eru sera fegnir um hendan bilin, sigur Símun Simonsen, brandmeistari í Vestmanna.

Bilurin, sum er gjørdur í USA, er umbygdur til brandbil hjá MT-Bilum í Ólavsfirði í Íslandi.

Stjórin í MT-Bilum, Sigurjón Magnússon, er sjálvur komin til Føroya við bilinum, og hevur hann monterað alla leysu útgerðina í bilin, sum var í gamla bilinum.

Bilurin er stórur – totalvektin er átta tons. Hann hevur ein 235 hesta V-8 motor, sum eisini er turbo diesel. Hann hevur seks gear og fýrahjólstrekk. Bilurin hevur ein tvey tons vatntanga og 65 litra skúmveskutanga.

Umframt eldsløkkiútgerð, so hevur bilurin eisini útgerð at klippa bilar sundur við. Saksurin hjá vestmenningum kann klippa við einum trýsti upp á 38 tons og kanna trýsta sundur við einum trýsti upp á 8-9 tons. Eisini hevur bilurin spæl framman, so hann eitt nú kann toga ella halda bilum.

**28 sløkkiliðsmenn**

Í sløkkiliðnum í Vestmanna eru 28 mans, sum allir eru sjálvboðnir. Um eitthvørt er á vási, ringir teldan hjá Alarmsentralinum til sløkkiliðsmenninar, sum síðani boða sjálvvirkandi skipanini frá, um teir fáa boðini . Telduskipanin ringir, til 12 mans hava váttað, at teir hava fingið boðini.

**Sær ein marknað í Føroyum**

Sigurjón Magnússon heldur, at góðir møguleikar skuldu verið at selt fleiri sløkkiliðsbilar til Føroya.

– Tað er júst tykkara tørv, ið vit kunnu nøkta, tí vit gera bilar til smáar býir og bygdir, sigur hann.

Á verkstaðnum hjá MT-Bilum í Ólavsfirði gera teir umframt sløkkiliðsbilar eisini bátar í glastrevjum umframt annað, ið hevur við glastrevjar at gera.

Teir hava gjørt seks sløkkiliðsbilar higartil, og í løtuni eru tríggir í gerð, greiðir Sigurjón Magnússon frá.

Bilurin hjá Vestmanna sløkkiliði kostar um 850.000 krónur.




Eitt hátrýst yvir Bretsku Oyggjunum fer spakuliga eystureftir. Eitt lágtrýst yvir Atlantshavinum fer í ein norðan móti Íslandi, og brúgvaløg haðani hava regn við sær vestaneftir.




Tá brúgvaløgini eru farin framvið liggja oyggjarnar í einum hørðum útsynningsráki, sum ikki minkar fyrr enn síðst í vikuni.




**Hitalagið mált frá 14./06.kl 06$^{00}$–15./06. kl 06$^{00}$. Hitin í gjár: 7,9°C**
Minsti hiti máldur í juni: **0,0°** Mesti hiti máldur í juni: **20,0°**




Avfallið: 0,2 mm – **mált frá 14./06. kl 6$^{00}$–15./06. kl 06$^{00}$**
Avfallið higartil í juni: 35,4 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 3 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 20 |
| Tromsø | 9 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannahavn | 16 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 27 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 30 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 26 |
| Róm | – |
| Malorca | 25 |
| Athen | 35 |
| Malta | – |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | – |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 15 |
| New York | 16 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

## Vestfalskyrrindi

16. juni: Fullmáni
18. juni: Mánin longst frá jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. juni | 6.51 | 19.10 | 5.51 | 18.10 | 6.06 | 18.25 | 8.51 | 21.10 | 9.51 | 22.10 | 5.06 | 17.25 | 4.06 | 16.25 | 7.06 | 19.25 | 8.06 | 20.25 | 6.36 | 18.55 | 7.51 | 20.10 |
| 17. juni | 7.28 | 19.48 | 6.28 | 18.48 | 6.43 | 19.03 | 9.28 | 21.48 | 10.28 | 22.48 | 5.43 | 18.03 | 4.43 | 17.03 | 7.43 | 20.03 | 8.43 | 21.03 | 7.13 | 19.33 | 8.28 | 20.48 |
| 18. juni | 8.07 | 20.25 | 7.07 | 19.25 | 7.22 | 19.40 | 10.07 | 22.25 | 11.07 | 23.25 | 6.22 | 18.40 | 5.22 | 17.40 | 8.22 | 20.40 | 9.22 | 21.40 | 7.52 | 20.10 | 9.07 | 21.25 |
| 19. juni | 8.43 | 21.02 | 7.43 | 20.02 | 7.58 | 20.17 | 10.43 | 23.02 | 11.43 | – | 6.58 | 19.17 | 5.58 | 18.17 | 8.58 | 21.17 | 9.58 | 22.17 | 8.28 | 20.47 | 9.43 | 22.02 |

Kelda: Skipalistin 2000

KLINIKK FYRI FÓTTERAPI
STATSAUTORISERET FODTERAPEUT
Dagmar Andrea Svabo
TJARNARDEILD 2
FEDERATION INTERNATIONALE DES PODOLOGUES
TEL 31 07 27

sosialurin
www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes